VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Sigur fyri Obama og USA

Amerikanska Umboðsmannatingið samtykti fríggjadagin eitt tað mest umstrídda lógaruppskotið nakrantíð í amerikanskari politiskari søgu. Uppskotið um at veita øllum amerikonskum borgarum heilsutrygd varð samtykt við 220 móti 215 atkvøðum. Ein tepur sigur, tó at hetta var eitt avgerandi vegamót í royndunum hjá fleiri amerikonskum forsetum at fáa eina heilsutrygdarskipan samtykta.

Orðaskiftið um nýggja heilsureformin hevur fylt nógv í amerikanska samfelagnum í eina tíð. Mótstøðufólkini hava brúkt allar hugsandi metodur til at forða fyri uppskotinum og eru tey mest niðursetandi ókvæmisorðini, sum finnast, brúkt móti nýggja forsetanum Barack Obama, sum tó hevur staðið rimmarfastur um hetta uppskotið.

Fyrrverandi demokratiskir forsetar hava eisini havt almennu heilsutrygdina í sínum skjaldaramerki men hava verið noyddir til at gevast á hálvum gekki, tí undirtøka fekst ikki fyri einum slíkum uppskoti á tí politiska pallinum.

Hesaferð hevði Obama fólksins undirtøku, hóast mótstøðan hevur verið øgilig. Allur republikanski flokkurin í Umboðsmannatinginum við undantaki av einum tinglimi atkvøddi ímóti uppskotinum, og haraftrat vórðu 39 demokratar ímóti, men hetta var kortini ikki nóg mikið til at fella uppskotið.

Allar súður eru tó ikki syftar enn. Nú skal uppskotið fyri Senatið, har flokkarnir standa meira javnir. Men mett verður, at sigurin í Umboðsmannatinginum er eitt so týðandi vegamót, at tað skal nógv til fyri at steðga málinum, nú tað er komið so langt. Hinvegin skal eisini gerast stórt arbeiði til tess at fáa uppskotið víðari í politisku skipanini og loksins aftur til Hvítu Húsini, har Obama kann seta sína endaligu undirskrift á.

Í dag er støðan hjá milliónum av amerikanarum út av lagi vánalig, tá tað snýr seg um so grundleggjandi rættarviðurskifti sum heilsutrygd. Hevur tú ikki eina rímuliga inntøku og harvið møguleika fyri at tryggja teg og rinda fyri sjúkrahjálp, so er tú í veruleikanum á berum. Hóast stórur munur er á heilsutrygdarskipanum í okkara parti av heiminum og tí uppskoti, sum Obama nú stendur á odda fyri, so er hetta kortini ein stór broyting í tí annars konservativa USA.

Vit, sum eru so heppin at liva í Norðurlondum, ið hava heimsins bestu skipanir í so máta, kunnu so bara seta okkara álit á, at tað fer at eydnast Obama og hansara fólkum at bera uppskotið víðari á mál, soleiðis at vanligi amerikanarin kann kenna seg meira tryggan í gerandisdegnum.

Sosialurin

Koyr poppin í fløskuna!

INGEBORG VINTHER
forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag

Tað eru 1000 ófaklærd um alt landið í øllum aldursbólkum, sum standa í kø fyri at sleppa inn á arbeiðsmarknaðin. Arbeiðsmarknaðurin niðurleggur hvørja viku støvr, og samstundis standa Sjúrður Skaale, Bjørt Samuelsen og nakrir fáir arbeiðsgevarar í einum horni og rópa í kór um at loyva evropeiskari arbeiðsmegi frítt inn til Føroyar at arbeiða

Sjúrður Skaale hevði í vikuni eitt undarligt lesarabræv: »Skal proppurin aftur setast í fløskuna?«. Í hesum brævi var Føroya Arbeiðarafelag skýrt at halda løgtingið til gísla, tí vit vilja hava, at løgtingið fylgir síni egnu samtykt um at støðga fyri fríum innflutningi av evropeiskari arbeiðsmegi.

Støðan hjá Sjúrða Skaale og Bjørt Samuelsen er ikki annað enn poppur, ið helst ljóðar sum góður tónleikur í oyrunum á nøkrum fáum arbeiðsgevarum.

Hetta er ein einføld tekstbóka greining, sum møguliga er rætt í nøkrum samfeløgum, ið hesi royna at kroysta inn yvir okkara sera lítla og viðbrekna arbeiðsmarknað.

Arbeiðsloysi hetta seinasta árið er vaksið umleið 250% - úr 300 fólkum upp í 1300 fólk.

Samlaða arbeiðsloysi hevur verið omanfyri 3,5% síðani juli mánaði, tí halda vit tað vera sjálvsagt, at tað ikki er fullkomiliga fríar ræsur fyri arbeiðsmegi uttanfyri Norðanlond at koma til Føroyar at starvast.

Egin samtykt

Hví Sjúrður Skaale er so óður um, at føroyski arbeiðsmarknaðurin fer frá eini skipan við fríum innflutningin av evropeiskari arbeiðsmegi til eina skipan har atlit skulu takast til arbeiðsmarknaðin her heima er ófatiligt, eftirsum hann sjálvur samtykti hesa lóg í fjør summar.

Um ásetingin var so vánalig, so átti Sjúrður Skaale havt latið vera við at atkvøtt fyri lógini um evropeiska arbeiðsmegi!

Ella er Sjúrður Skaale vanur at samtykkja lógir, sum hann ikki ordiliga meinar skulu vera fylgdar?

Ikki tí, tað skal sjálvandi vera loyvt at broyta meining, men fyri okkum, sum vara av einum parti av arbeiðsmarknaðinum, er hetta óskilligt, og eg skal royna at greiða frá, hví so er.

Arbeiðsloysi hjá ófaklærdum uml. 10%

Tey fólk, sum koma hendavegin at arbeiða, fara at kalla øll at starvast innan ófaklærda økið hjá arbeiðarafeløgunum, og nøkur fá starvast innan handverksvinnuna. Allar aðrar vinnur hava til allar tíðir litið á føroyska arbeiðsmarknaðin.

Hvussu nógv støvr eru innan ófaklærda økið er sjálvsagt trupult at meta neyvt um, men út frá limatølum hjá ymiskum fakfeløgum og tølum frá Hagstovu Føroya ber til at siga, at tað eru áleið 10.000 arbeiðsfólk innan traditionella ófaklærda økið.

Íroknað eru tey vanligu yrkini, sum sáttmálarnir hjá arbeiðarafeløgunum fevna um umframt onnur grásonu øki, har ongir sáttmálar eru, men sum kortini mugu metast hoyra til ófaklærda økið.

Til hesi 10.000 støvr eru í løtuni beint omanfyri 1000 føroyingar sum sita heima, tí onki arbeiði er til teirra.

Hesi tøl eru frá arbeiðsloysisskipanini og Hagstovuni, har nýggjastu uppgerðirnar vísa, at knapt 80% av teimum sum gerast arbeiðsleys eru ófaklærd. Uppgerðin byggir á, at øll tey sum ikki hava aðra skúlagongd ella yrkislæru enn fólkaskúlan eru mett sum ófaklærd.

Av teimum 1300 fólkunum, sum í dag eru arbeiðsleys, eru beint omanfyri 1000, arbeiðsleys um alt landið í øllum aldursbólkum, sum kunna røkja støvr innan ófaklærda økið, og sum bara hava atgongd til støvr innan hetta øki.

Ófaklærda økið

Um hugt verður eftir, hvørji støvr útlendingar, sum koma til Føroyar at arbeiða, hava, so er hetta nærum einans innan ófaklærda økið umframt nakrar handverkarar.

Tað er ongin og hevur ongin eftirspurningur verið eftir nøkrum øðrum slagi av arbeiðsmegi uttanífrá.

Úrslitið er tískil í løtuni, at fyri hvønn útlending, sum verður tikin inn í landi at arbeiða, so verður ein føroyingur sendur til hús.

Arbeiðsmegin sum kemur uttanífrá er í dag tøk um alt landið.

Tað er tí okkum óskiljandi, at Sjúrður Skaale øsir seg upp um, at løgtingið fylgir egnu samtykt og sigur, at hædd má takast til arbeiðsmarknaðarstøðuna, nú tøkar hendur eru til øll støvr.

Tað sum vit eisini óttast er, at fráflytingin fer at taka dik á seg, tí tilboð um støvr, førleikamenning ella útbúgving eru ongi fyri tey fólk, ið eru komin nakað til árs, og sum ikki hava ráð at liva av útbúgvingarstuðli.

Arbeiðsmarknaðarpolitikkurin hjá Sjúrða Skaale kann tískil viðføra, at fleiri ófaklærd koma innar í landi at starvast, meðan ófaklærdir arbeiðsleysir føroyingar noyðast av landinum fyri at fáa støvr ella tilboð um førleikamenning, starvsvenjing ella útbúgving.

Eru fólk fyrst farin er truplut at fáa tey aftur. Hetta er í øllum føri ein av beisku lærdómunum frá 1990'unum, tá ið vit mistu fleiri túsund fólk til arbeiðsmarknaðir í hinum Norðurlondunum.

Arbeiðsmarknaðurin opin

Føroyski arbeiðsmarknaðurin er heldur ikki meir afturlatin enn tað sama, at verður tørvur á fólki við serligum førleikum, so er hetta gjørligt óansæð, um tú fylgir lógini um evropeiska arbeiðsmegi ella hinari lógini, ið sigur at »væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn« skulu takast, tá ið arbeiðsmegi kemur inn í landi.

Tað skal vera mín vón, at Sjúrður Skaale og onnur tingfólk gera eina ætlan um, hvussu forða vit fyri at fleiri gerast arbeiðsleys? Hvat við arbeiðsskapandi tiltøkum, og hvørji tilboð eru til tey arbeiðsleysu?

Eisini kundi Sjúrður Skaale ómakað sær at kanna, hví tey fólk - uppvaksin uttanfyri norðanlond, men sum hava føroyskar hjúnaðafelaga - ikki kunna fáa støvr innan onnur øki enn tað ófaklærda, hóast tey mangan hava góðar útbúgvingar?

Hví eru tey einans nóg góð til vaskistørvini og flakavirkisstørv, men ikki til at starvast innan fyrisiting ella í lærdum støvum í privatu vinnuni, hóast førleikarnir á pappírinum skuldu verið tilstaðar?

Sjúrður Skaale skrivaði annars so nógv fjákut, sum ikki er vert at viðmerkja í lesarabrævinum »Skal proppurin aftur setast á fløskuna?«

Tað skal tí vera mín áheita á teg Sjúrða Skaale um at koyra poppin í fløskuna og skrúva væl fyri.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.